Til móttakaran á viðhefta yvirliti

**Tórshavn 4. juli 2013**
Journalnr.: 13/00210-3

**Uppskot til kunngerð um minstukrøv til tryggingarfeløg í sambandi við tekning av bygningsbrunatrygging**

Tryggingareftirlitið sendir við hesum *Uppskot til kunngerð um minstukrøv til tryggingarfeløg í sambandi við tekning av bygningsbrunatrygging* til hoyringar. Sí viðhefta fylgiskjal.

Í sambandi við gjøgnumgongd av galdandi kunngerð nr. 17 frá 15. desember 2008 um minstukrøv til tryggingarfeløg í sambandi við tekning av bygningsbrunatrygging, er Tryggingareftirlitið vorðið varugt við, at kunngerðin fevnir ikki um útlendsk skaðatryggingarfeløg, ið kunnu veita tænastuveitingar í Føroyum innan tryggingarflokk 8 – Eldur og náttúrumegi, og harvið tekna bygningsbrunatrygging.

Í mun til galdandi kunngerð verður strikað § 1, stk. 2, ið allýsir hugtakið tryggingarfelag, soleiðis at útlendsk tryggingarfeløg, ið veita tænastuveitingar í Føroyum framyvir eisini verða fevnd av kunngerðini, sbr. § 1, stk. 1.

Uppskotið til kunngerð svarar í høvuðsheitum til galdandi donsku kunngerðina hjá Finanstilsynet *bekendtgørelse nr. 856 af 21/10/2002 om minimumsbetingelser for forsikringsselskabers tegning af bygningsbrandforsikring*.

Kunngerðin um minstukrøv til tryggingarfeløg í sambandi við tekning av bygningsbrunatrygging verður eftir ætlan sett í gildi 1. august 2013.

Møguligar viðmerkingar til uppskotið skulu vera Tryggingareftirlitinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. juli 2013. Viðmerkingarnar og spurningar kunnu sendast við telduposti til gn@tryggingareftirlitid.fo ella til Tryggingareftirlitið stílað til Gudmundur E. Nónstein, Skálatrøð 20, Postboks 73, FO-110 Tórshavn.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein

Insurance Authority, Skálatrøð 20, P. O. Box 73, FO 110 Tórshavn, Tel +298 35 60 20, Fax +298 35 60 35, www.tryggingareftirlitid.fo